

# KONGSHÚSIÐ SÁ FØROYSKA SNIÐGEVING

Til gallakvøldið, sum varð hildið í Norðurlandahúsinum mánakvøldið, vóru tveir føroyskir sniðgevar, sum sýndu sínar vørur fram fyri teimum royalu og meginpartinum av VIP fólkunum í Føroyum. Tær vóru Guðrun Ludvig frá Guðrun & Guðrun og Borgný Dam Patursson.

## Borgný Dam Patursson





*Við ullini sum grundtilfari gongur Borgný nýggjar leiðir og setur saman tað, ið eingin fyrr hevur roynt. Við gazu og leður, bjartlittum tilfari, sum er tøvt inn í føroysku seyðaullina, sameinir Borgný til fullnar tað, sum kann tykjast ósambæriligt. Borgný fær íblástur úr ótamdu náttúruni – stormur og friðsemi, óbrýnt og bleytt, siðbundið og nýtt.*

## Guðrun Ludvig





*Guðrun & Guðrun hava frá fyrstu kollektión spælt við mótsetningum – bæði tá ið umræður tilfar og litir. Tilfarið er rátt og vilt, samstundis sum tað er fonnlætt og skygt. Litirnir eru bæði mildir og sterkir – júst sum litirnir í færoysku náttúruni. Endamálið í sniðgevingini er at sameina kvinnuliga lættleikan við stórbæru og samansettu náttúruna.*



*Eftir sýningina komu allar modellirnar út aftur, saman við sniðgevunum, sum – júst sum í stóru mótasýningunum – fingu blómur og vórðu heiðraðar.*



*Myndatekstur – Petrina Berg, ið var frásøgufólk á kvøldinum, var eisini í einum løttum kjóla frá Guðrun & Guðrun*



## Eivør Pálsdóttir

Eivør Pálsdóttir er eisini heimskend í Føroyum fyri at tora at ganga nýggjar leiðir innan klædnastíl. Ferð eftir ferð hevur hon yvirraskað og sjokkerað við sínum sermerktu klæðum.

Á gallakvøldinum mánakvøldið var hon eisini í einum sermerktum kjóla.

Tað er Svanhild Strøm, sum fleiri ferðir áður hevur seymað uppá Eivør, sum eisini hesuferð hevði havt gongd í nálini. Tær hava eitt stak gott samstrav og hóska væl saman. Svanhild hevur eftirhondini seymað einar 10-15 kjólar til Eivør.

Grøni kjólin er bundin og var til endamálið settur saman við einum svørtum toppi, sum Svanhild eisini hevur seymað.

Eivør hevur fyrr verið í bæði toppinum og kjólanum, men ongantíð áður hevur hon borið pløggini í senn. Men tað riggaði avbera væl, og styðjaði eisini uppundir hennara gátuføru og lokkandi framførðslu.